# Púra opið í toppinum

**Eisini í botninum tykist spenningurin fara at gerast størri, enn tað higartil hevur sæð út til, at hann skuldi verða**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað er púra opið í stríðnum um DM. Tá ið støðan 2. páskakvøld varð gjørd upp eftir tað 25. av 33 umførum, var bara eitt stig frá Esbjerg á fremsta plássinum og aftur til Brøndby, sum nú er nummar trý. Esbjerg er eitt stig frammanfyri FCK, sum er javnt við Brøndby í stigum, men er hægri á støðutalvuni, tí málmunurin hjá teimum er eitt mál betri.

Einki føroyskt íslett var í superliguni á páskum. Jákup á Borg var ikki partur av OB hópinum, og Todi Jónsson bíðar framvegis eftir at sleppa framat aftur í FCK.

Tað gongur strúkandi hjá FCK, sum aftur hesa ferð fekk fulla úrtøku. Í seinastu seks dystunum hava teir fingið fimtan stig. Tað var bara í Parkini ímóti Viborg, at teir taptu 1–0. Ta ferðina vardi Viborg fyri tað mesta. Tað tóktist 1. páskadag eisini vera ætlanin hjá Frem. Men eftir at Álvaro Santos í 5. minutti hevði lagt FCK framum, og verjuspælarin Ole Tobiasen í 59. minutti hevði økt til 2–0, varð Frem hamskift. Teir vóru síðsta hálva tíman ágangandi, og teir iðraðu seg um, at tað ikki eydnaðist at vinna eitt stig.

Lars Brøgger minkaði um munin, og tá ið tað restaðu tíggju minuttir, javnaði hann til 2–2. Tríggjar minuttir undan leikloki eydnaðist tað FCK at fáa sigursmálið. Álvaro Santos var tryggur úr ellivu metrum. Brotssparkið varð dømt, eftir at Jesper Bech varð feldur. Nýggi álopsspælarin var komin á vøllinum stutt frammanundan.

Hesa ferð var Peter Møller í FCK álopinum saman við Álvaro Santos. Zuma var framrættaður miðvallari, og hann noyddist at fara av vøllinum, tí hann var skaddur. Áhugin fyri at síggja FCK er framvegis stórur. Hesa ferð vóru 21.617 í Parkini og hugdu at.

Í Esbjerg endaði tað málleyst í toppdystinum. Áhugin fyri fótbólti er størri har, enn hann hevur verið. Tað sást á áskoðaratalinum. Tá ið Brøndby vitjaði, møttu 10.966 upp. Tað var tætt og nógvir intensir nærdystir. Men polerað fótbóltsspæl var ikki nógv at síggja til. Venjararnir báðir vóru samdir í, at høvuðsorsøkin til ikki serliga vakra spælið var, at vøllurin var ikki nóg slættur.

OB fekk einki við um Lítlabelts brúnna, eftir at teir høvdu vitjað á nýggja heimavøllinum hjá FCM í Herning. 11.500 áskoðarar sóu heimaliðið vinna 3–1. Serliga egyptiski álopsspælarin Mohammed Zidan var væl upplagdur. Hann skoraði øll málini hjá heimaliðnum. Hetta var fyrsti stigamissurin hjá OB síðani vetrarsteðgin. OB er framvegis fýra stig frá oddasessinum.

Í Aalborg var lagið gott eftir 4–1 sigurin á AGF. 8.798 møttu upp. Tey sóu, at AGF leikliga var heilt væl við, men at tað var heimaliðið, sum fekk úrtøkuna og við 4–1 sigri legði sjógv aftur til FCM og 6. plássið.

### Spennandi í botninum

Inntil fyri stórari viku síðani bendi alt á, at AB var upplagdur niðurflytari. AB er framvegis aftast, men nú eru bara seks stig fram til triði aftasta plássið. Tann munin er ikki óhugsandi, at AB fer at fáa burtur. Eftir 6–0 avhølvingina í Herning herfyri hevur AB vunnið tvær ferðir. Mánadagin vóru teir í Herfølge, og teir vunnu 1–0.

FCN er triði aftast, og tað gekk illa hjá teimum á heimavølli. Viborg vann 4–0. Viborg venjarin staðfesti aftaná, at nú fer hansara lið ikki at flyta niður. Viborg, sum seinnu árini hevur verið í vanda inntil kappingarlok, er fjúrtan stig frá næstaftasta plássinum.

Í 26. umfarinum er skráin henda: AB–FCK, AGF–FCN, Brøndby–AaB, Frem–FCM, OB–Esbjerg og Viborg–Herfølge.

**Danska superligan**

| | | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Esbjerg | 25 | 15 | 7 | 3 | 53 | 26 | 27 | 52 |
| 2 | FCK (M) | 25 | 15 | 6 | 4 | 40 | 21 | 19 | 51 |
| 3 | Brøndby (S) | 25 | 15 | 6 | 4 | 39 | 21 | 18 | 51 |
| 4 | OB | 25 | 14 | 5 | 6 | 53 | 35 | 18 | 47 |
| 5 | AaB | 25 | 11 | 7 | 7 | 39 | 32 | 7 | 40 |
| 6 | FCM | 25 | 9 | 6 | 10 | 46 | 39 | 7 | 33 |
| 7 | Viborg | 25 | 8 | 8 | 9 | 37 | 32 | 5 | 32 |
| 8 | AGF | 25 | 8 | 3 | 14 | 35 | 52 | -17 | 27 |
| 9 | Herfølge | 25 | 7 | 5 | 13 | 24 | 34 | -10 | 26 |
| 10 | FC Nordsj. | 25 | 5 | 8 | 12 | 26 | 46 | -20 | 23 |
| 11 | Frem | 25 | 5 | 3 | 17 | 27 | 48 | -21 | 18 |
| 12 | AB | 25 | 5 | 2 | 18 | 20 | 53 | -33 | 17 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jákup á Borg (OB)

**Danska 1. deild**

| | | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Silkeborg | 19 | 13 | 4 | 2 | 39 | 14 | 25 | 43 |
| 2 | AC Horsens | 19 | 14 | 1 | 4 | 33 | 13 | 20 | 43 |
| 3 | Randers FC | 19 | 13 | 2 | 4 | 50 | 28 | 22 | 41 |
| 4 | HFK Sønderj. | 19 | 11 | 3 | 5 | 49 | 25 | 24 | 36 |
| 5 | Køge | 19 | 10 | 5 | 4 | 36 | 27 | 9 | 35 |
| 6 | Skjold | 19 | 9 | 3 | 7 | 39 | 32 | 7 | 30 |
| 7 | Nykøbing | 18 | 8 | 3 | 7 | 31 | 30 | 1 | 27 |
| 8 | Fredericia | 19 | 7 | 5 | 7 | 26 | 28 | -2 | 26 |
| 9 | Ølstykke | 18 | 8 | 1 | 9 | 39 | 37 | 2 | 25 |
| 10 | FC Nordjylland | 18 | 7 | 4 | 7 | 21 | 26 | -5 | 25 |
| 11 | B 93 | 18 | 5 | 5 | 8 | 27 | 31 | -4 | 20 |
| 12 | Brønshøj | 19 | 5 | 3 | 11 | 23 | 44 | -21 | 18 |
| 13 | Vejle | 19 | 4 | 4 | 11 | 26 | 40 | -14 | 16 |
| 14 | Fremad Amager | 19 | 3 | 6 | 10 | 25 | 36 | -11 | 15 |
| 15 | FC Aarhus | 19 | 4 | 2 | 13 | 20 | 45 | -25 | 14 |
| 16 | B 1913 | 19 | 1 | 5 | 13 | 13 | 41 | -28 | 8 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen,(Vejle), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

**Danska 2. deild**

| | | d | v | j | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Næstved | 19 | 12 | 3 | 4 | 43 | 17 | 26 | 39 |
| 2 | Dalum | 19 | 12 | 3 | 4 | 47 | 28 | 19 | 39 |
| 3 | HIK | 19 | 9 | 6 | 4 | 36 | 30 | 6 | 33 |
| 4 | Holbæk | 19 | 9 | 5 | 5 | 34 | 28 | 6 | 32 |
| 5 | Slagelse | 19 | 9 | 3 | 7 | 36 | 28 | 8 | 30 |
| 6 | Kolding FC | 19 | 9 | 3 | 7 | 34 | 31 | 3 | 30 |
| 7 | B1909 | 19 | 8 | 3 | 8 | 37 | 31 | 6 | 27 |
| 8 | Brabrand | 18 | 7 | 5 | 6 | 37 | 27 | 10 | 26 |
| 9 | Jetsmark | 18 | 7 | 5 | 6 | 28 | 30 | -2 | 26 |
| 10 | Lyngby | 19 | 6 | 7 | 6 | 33 | 36 | -3 | 25 |
| 11 | Kalundborg | 19 | 6 | 5 | 8 | 42 | 44 | -2 | 23 |
| 12 | Holstebro | 19 | 6 | 3 | 10 | 33 | 41 | -8 | 21 |
| 13 | Glostrup | 19 | 6 | 3 | 10 | 29 | 37 | -8 | 21 |
| 14 | Hvidovre | 19 | 4 | 5 | 10 | 21 | 40 | -19 | 17 |
| 15 | Hjørring | 19 | 5 | 2 | 12 | 23 | 55 | -32 | 17 |
| 16 | Skive | 19 | 4 | 3 | 12 | 33 | 43 | -10 | 15 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)

# Liðugt hjá Kjeldbjerg




*Annan páskadag var Jakob Kjeldbjerg fyri seinastu ferð studiovertur í Onside*
*Mynd: Viasat Press*




*Nýggjur maður í sjónvarpsstovuni verður Peter Piil*
*Mynd: Viasat Press*

Síðani TV3 fyri nøkrum árum síðani keypti rættindini at senda frá donsku superliguni, hevur Jakob Kjeldbjerg verið fastur fúsur í mongum føroyskum sjónvarpsstovum.

Hvørt sunnukvøld – meðan kappingin hevur verið í gongd – hevur hann sagt frá, hvussu gongdin hevur verið í ymsu dystunum, eins og nógvir aðrir forvitnisligir tættir viðvíkjandi donskum fótbólti hava verið tiknir upp.

Nú er hetta tó liðugt. Annan páskadag takkaði Kjeldbjerg fyri seg, og framyvir verður tað Peter Piil, sum fer at hava høvuðsleiklutin í onsidestuidonum.

Heilt burtur frá sjónvarpinum fer vælumtókti Kjeldbjerg tó ikki. Í næstum fer hann nevnliga undir upptøkurnar til næstu sendirøðina av Robinson-ekspeditiónini, har hann er maðurin, sum skal loysa Thomas Mygind av.

**-jm**




# HALDIÐ SOSIALIN

**400,-** um ársfjórðingin

- sparið **450,-**

í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Postnr.: ____________

Bygd/býur: ____________

Telefon nr.: ____________

Undirskrift: ____________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

**64**

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO